## Byrsumúli fyllir runt

Í morgin eru 30 ár liðin, síðani Veiðifelagið Byrsumúli varð stovnað, og hetta verður hátíðarhildið á skjótibreytini í Sandvíkum, sum millum annað verður opin fyri almenninginum, umframt at ymisk tiltøk verða. Lagt verður fyri klokkan 10 við tveimum framsýningum, fyrst við Trap-skjóting og hálvan tíma seinni við Skeet-skjóting. Aftaná kunnu fólk sleppa at royna seg, umframt at kaffi og køkur eru at fáa á staðnum.



## Nýggj várkapping

Veiðifelagið Byrsumúli fer leygardagin 10. apríl at hava ta fyrstu útgávuna av einari nýggjari várkapping, sum ætlanin er at hava á hvørjum ári. Hetta verður ein kombinerað Trap- og Skeet-kapping, har skjótast skulu trý umfør, sum telja 25 dúgvur hvørt. Skjúttin kann so sjálvur velja, hvørjari grein hann skjýtar tvey umfør av. Steyp eru til tríggjar teir fremstu skjúttarnar, og vinnarin fær somuleiðis ferðasteyp.

### Stjørnan-Tjaldur 27-19 (14-8):

# Stjørnan aftur føro

**Eftir at FM-steypið síðsta árið hevur staðið í Runavík, er tað komið aftur til Klaksvíkar. Hetta gjørdist greitt, tá Stjørnan í gjárkvøldið eisini vann aðru finaluna ímóti Tjaldri**




Hilmar Jan Hansen

Stjørnan vant týskvøldið burtur úr Tjaldri í Runavík og vann við 14 málum, og eftir fyrra hálvleik í Klaksvík í gjárkvøldið bendi alt eisini á, at sigurin hesa ferð fór at gerast líka trivaligur, tí hálvleiksstøðan var 14-8 til Stjørnuna, sum hevði fingið nógv at rigga, meðan mestsum einki riggaði hjá Tjaldri.

Men fram ímóti steðginum sá út til, at verjan hjá Tjaldri byrjaði at koyra betur, og eftir steðgin vísti liðið tað verjuspælið, sum var ein stór orsøk til føroyameistaraheitið í fjør. Tjaldur stongdi av, so Stjørnan ikki slapp til nakað sum helst, og fyrsta korterið av seinna hálvleiki skoraði Tjaldur átta ferðir og Stjørnan bara tvær ferðir – og tá klokkan á vegginum vísti 13:46, var Adina Petrea á blettinum, og so stóð brádliga á jøvnum, 16-16.

Hetta kløkkaði heimaáskoðararnar, tí fáur hevði roknað við, at dysturin skuldi fáa slíka vend. Men so mentist Stjørnan spakuliga og byrjaði aftur at skora. Tá Joan Midjord Joensen við einum skjótum fótskifti snýtti Tjaldurs-verjuna og skoraði til 19-16, líktist dysturin aftur sær sjálvum.

### Greipan til Klaksvíkar

Tjaldur kom ongantíð afturíaftur, og tað endaði við enn einum greiðum sigri til Stjørnuna, ið vann við átta málum, tá avtornaði. Breiddin hjá klaksvíkskvinnum var enn eina ferð munurin, tí Stjørnan kundi alla tíðina seta úthvíldar spælarar inn, samstundis sum tær føstu hjá Tjaldri bara møddust.

Rómurin var øgiligur, tá dysturin endaði og fegnu Stjørnu-fjepparanir tustu inn á vøllin. Enn eina ferð hevði tað eydnast felagnum at vunnið eitt meistaraheiti, sum er tað áttanda í røðini, heitið hesa ferð var bara undirstrikingin av einum fantastiskum kappingarári hjá klaksvíkskvinnum.

Stjørnan hevur í ár eisini vunnið steypakappingina, so greipan endaði altso í Klaksvík. Og í føroyameistarakappingini hava tað síðstu sjey árini bara verið Tjaldur í fjør og VB í 2005, sum hava brotið sigursrøðina hjá Stjørnuni!



## Stjørnan – føroyameistari og steypavinnari 2010

**Aftast frá vinstru:** Jógvan L. Nolsøe, Morten Hust Petersen, Ella Petersen, Valentina Suciu, Durita Christophersen, Durita Ljósstein, Diana Poulsen, Anna Kristina Samson, Edit Hansen, Simona Petersen, Sylvan Jakobsen. **Fremst frá vinstru:** Judit Hansen, Annika Ljósstein, Joan Midjord Joensen, Kristina Griksaite, Kristina Mikkelsen, Bára Skaale Klakstein, Una Olsen. **Sitandi fremst:** Maria Ziskason

Myndir: Álvur Haraldsen

## Saknar fleiri avbjóðarar

Liðformaðurin hjá Stjørnuni, Una Olsen, kundi eftir dystin taka ímóti enn einum steypi, tá hon fekk føroyameistarasteypið handað uppi á pallinum, ið bleiv riggaður til í skundi. Frammanundan hevur hon eisini tikið ímóti steypinum í Coca-Cola kappingini, so hetta hevur verið eitt gott kappingarár hjá Stjørnuni:

– Sjálvandi hevur hetta kappingarárið verið betri hjá okkum, enn tað í fjør, men eg vil allíkavæl siga, at tað var spell, at tað skrædnaði so tíðliga í ár. Tjaldur er eitt gott lið og hevur givið okkum ein skarpan gang, men tað hevði verið stuttligari, um eini tvey lið aftrat bjóðaðu av, sigur hon.

Um henda síðsta dystin helt hon, at tekniskir feilir frá Stjørnuni gjørdu, at tað gjørdist ríkiliga spennandi.

– Eg vil siga, at tað var ótrúliga deiligt, at vit ikki gjørdu tað meira spennandi, enn tað bleiv, tí hetta var alt ov spennandi. Vit gjørdu nógvar tekniskar feilir og fingu eitt sindur av gummiørmum, meðan tær komu nærri og nærri, samstundis sum vit bara ikki fingu mál. Men tíbetur kom hol á, og so kundu vit koyra tað heim, sigur Una Olsen.

hil